# Nýggja Norrøna flaggskipið í Norðuratlantshavi

**Nýggja Norrøna kemur í tøkum tíma. Hon fer at menna eina nýggja dimensión í ferðavinnuni á okkara leiðum, nevniliga hana, at siglingin fer at verða ein týðandi partur av allari feriuupplivingini heldur Bjarni Djurholm, landsstýrismaður, sum varð við til sjósetingina av Norrønu leygardagin**

FERÐAVINNA
*Jan Müller úr Lübeck*




*Bjarni Djurholm og konan, Eydna Djurholm vóru við til hátíðarhaldið í Lübeck leygardagin*

Millum mongu gestirnar til sjósetingina av nýggju Norrønu var eisini landsstýrismaðurin í ferðavinnumálum, Bjarni Djurholm.

– Hetta skipið, sum er farið av bakkastokki, fer at hava ómetaliga stóran týdning fyri møguleikarnar at menna ferðavinnuna í Føroyum. Skipið lýkur tey nútíðarkrøv til hentleikar, sum tann ferðandi setur sum eitt sjálvsagt krav í dag. Tvs. at tann ferðandi kann nú njóta farleiðina millum Føroyar og útlondini sum ein part av síni frítíð og ikki sum eitt stað, har hann skal parkerast í ávíst tímatal fyri at koma fram til eitt ávíst pláss. So tann ferðandi kann inkludera sjálva ferðina við Norrønu við síni positivu upplivilsi í feriuni. Og tað fer at verða ein stórur fyrimunur fyri ferðavinnu í Føroyum, tí vinnan tá hevur betri møguleika at selja Føroyar sum eitt ferðamannaland sigur Bjarni Djurhol, sum eisini vónar og ynskir, at tað fer at ganga Smyril Line væl, og at tað fer at fáa raksturin at bera seg við hesum stásiliga skipinum.

Talan er um eitt tað størsta einstaka projektið í føroyskari søgu. Uppá fyrispurning hvat hann heldur um kostnaðin, meira enn 700 mill. kr. og møguleikarnar at klára seg, sigur Bjarni Djurholm, at tað er eingin ivi um, at Smyril Line hevur fyri neyðuni at fáa eitt nýtt skip, og tá tú skal hava eitt skip, sum skal lúka nútíðar krøv og krav til komfort, so skal tú av við nógvar pengar. – Givið er at teir skulu forrenta og avskriva ein stóran kapital. Tað er so mín og landsstýrisins vón, at hetta fer at hepnast teimum. Um kostnaðin av skipinum hevur landsstýrismaðurin onga meting, men kann bert staðfesta, at tað var neyðugt at byggja nýtt skip.

Honum dámar annars væl, at útlendskur kapitalur er við til at fíggja skipið. – Tað er í sær sjálvum positivt, at man kann spjaða váðan. Føroyingar eiga meirilutan av skipinum, og tað er gott. At aðrir átaka sær váða á hesi farleiðini er ein trygd fyri allar íleggjararnar.

– Men kemur tað hartil, at fíggjarlig bakkøst í samfelagnum fara at raka Smyril Line, vil landsstýrið so vera eins positivt sum tað var at geva hjálp sum táverandi landsstýrið var á sinni, tá gamla Norrøna hevði stuðul fyri neyðini í eitt tíðarskeið?

– Nú skal eg ikki taka nakrar sorgir uppá forskot. Men vísandi til tann politikk, sum er rikin seinastu árini og tað eg sjálvur havi lagt upp til, so er lítið sannlíkt til, at landið fer at involvera seg í slíkt projekt skuldi tað ikki gingið eftir ætlan.

Bjarni Djurholm, sum við egnum eygum hevur sæð nýggju Norrønu verða sjósetta, ivast ikki í, at skipið fer at gerast flaggskipið av øllum flaggskipum í Norðuratlantshavi í framtíðini.

– Eg trúgvi eisini, at tað er tí, at teir, sum eiga og gera íløgur, síggja eina skilagóða meining við hesum. Eg eri sannførdur um, at gongur tað ikki so væl, sum tað vónandi fer at gera, so vilja teir finna neyðugu loysnirnar.

Bjarni Djurholm ivast ikki í, at Smyril Line hevur tikið eina rætta avgerð um at byggja eitt nýtt skip. Hann vísir á, at í ferðavinnuhøpi, so hevur gongdin verður tann, at man skal royna at fáa spjatt ferðafólkaflutningin yvir størri part av árinum. Skal hetta bera til so má eitt betri og størri skip fáast. Verður satsað uppá at fáa ferðafólk hendavegin alt árið, so mugu vit eisini til at hugsa um at hava nakað at bjóða ferðafólki á landi aðrar tíðir á árinum.

Spurdur sum tað undrar hann, at so mong fólk eru boðin við til hátíðarhaldið í sambandi við sjósetingina sigur Bjarni Djurholm, at Smyril Line uttan iva ger hetta sum ein partur av marknaðarføringini. Og at man vil byrja longu nú er kanska heldur ikki so løgið, tí neyðugt er at marknaðarføra skipið í góðari tí. Tað skal longu í sigling komandi summar.


*Tórmaóður Djurhuus, nevndarformaður, gumman hjá Norrönu, Martha Hammer, og Óli Hammer, stjóri á Smyril Line*


Toftild Alternativt Hår

NÝTT HÁR!





**HOTEL HAFNIA (Loftið)**
Leygard. 14. september og
sunnud. 15. september
frá kl.14.00 - 19.00

**SJÓMANSHEIMIÐ
Í KLAKSVÍK**
Mánad. 15. september
kl.12.00 - 18.00

Vinarliga ring og bílegg tíð

*Nú koma vit aftur á vitjan í Føroyum.*
*Við okkum hava vit snotuligasta úrvalið av hárkollum og parúkkum.*
*Vit hava einaumboðan av nýggjari japanskari tægr, sum er einastandandi slitsterk, og tískil serstakliga vælegnað til fólk við kropsliga hørðum arbeiði - til dømis fiskimenn, handverkarar og onnur.*
*Hárluturin hevur ótrúlig evni at halda hársniði, og verður ikki sleipin sum frálíður. Harumframt er hann sera vælegnaður til varandi áseting.*
*Og júst varandi áseting er serøki okkara. Lagdur verður ein tráður undir húðina, og síðan verður hárluturin fastgjørdur. Nú vaskar og greiður tú hárið, sum var tað títt egna. Ein léttur og fittligur máti at endurnýggjað hárið. Sjálvur avger tú alt um lit, snið, bygnað o.s.fr.*
*Legg til merkis:*
*Vit eru fremstu útvegarar og serfrøðingar Danmarkar tá umræður øðrvísi hár, so kom innar og hygg at tilfarinum...*



HENNING TOFTILD
Toftild Alternativt Hår

BUDOLFI PLADS 9 DK-9000 AALBORG
TLF: 98 10 32 11 FAX: 98 13 36 22
www.alternativt-haar.dk

www.team85.fo/BOEL LAYOUT





